# Álvarsligt at sáa iva um ognarrætt til oljuna

OLJA OG OGNARRÆTTUR
*Jan Müller*

– Tað er ótrúliga groft at fara út og sáa iva um ognarrættin til oljuna, tá vit hava gjørt lógir og avtalur fyri milliardir og tá siga, at vit hava ongan rætt til tað.

Hetta sigur Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur, sum hevur verið við til at gera sáttmálar millum føroyskar fyritøkur og myndugleikar og útlendsk oljufeløg.

Hann sipar her til lýsing valdagin, har Høgni Hoydal nemur við ognarrættin til oljuna. -Tað er eingin ivi í míni verð, at varaløgmaður í lýsingini valdagin sáar iva um henda okkara rætt.

Jógvan Páll Lassen vísir á, at løgfrøðin í hesum málinum kann sammetast við, at eigur tú ein bil, sum er keyptur uppá avbetaling, og tú selur bilin, so kanst tú enda í fongsli.

- Tí er tað ein grov insinuatión, sum Høgni Hoydal, kemur við, tá hann sigur, at vit hava ikki rætt til oljuna. Tvs. at vit sum samfelag hava disponerað yvir nøkrum, vit ongan rætt hava til - og tað hava teir sjálvir verið við til. Undir vanligum umstøðum er tað svik. Tað er ótrúliga groft at fara út og sáa iva um ognarrættin til oljuna, tá vit hava gjørt lógir og avtalur fyri milliardir og viðganga, at vit hava ongan rætt til tað.

Jógvan Páll Lasssen heldur, at hetta málið er so mikið álvarsligt, at løgmaður átti at givið Høgna Hoydal ein sera stuttan snór og sagt honum, at avsannar hann ikki tað hann hevur sagt í hesi lýsingini, má hann víkja landsstýrissessin. - Varaløgmaður er eisini eitt slag av føroyskum uttanríkisráðharra, og eg dugi ikki at síggja, at løgmaður kann hava ein persón at samstarva við, sum er so langt við síðuna av tí, sum løgmaður sjálvur heldur og skal standa inni fyri.



*Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur heldur tað vera eitt alvorligt mál, tá varaløgmaður fer út og sáar iva um ognarrættin til oljuna.*

Og Jógvan Páll heldur fram: - Um vit ímynda okkum, at tað liggja milliardavirði í undirgrundini, og vit hava gjørt sáttmála við oljufeløgini um at útvinna hesi rættindini, og tað vísir seg, at vit ikki eiga tey, so fær føroyska samfelagið eitt risastórt endurgjaldskrav.

Jógvan Páll Lassen heldur spurningin um oljuna vera eitt so mikið álvarsligt mál, at leiðandi politikarar hava eina skyldu til ikki at koma út við skeivum og misvísandi úttalilsum. -Eitt er tað, at Páll á Reynatúgvu sigur hetta á valfundi í Norðurlandahúsinum, men tá floksformaðurin og varaløgmaður fer út og sáar iva um veruliga ognarrættin til oljuna í eini lýsing fyri sær sjálvum, so er tað ein manifestatión av hesum sama, og tá er tað alvorligt.

Jógvan Páll Lassen sigur víðari, at hevði hetta verið sagt av einum flokki í andstøðu, so hevði tað kanska ikki havt sama týdning, men hetta skulu vera ábyrgdarfullir persónar, sum hava verið við at gjørt kolvetnisló, og loyvini eru givin í teirra landsstýristíð.

- Um Høgni Hoydal meinar hatta, ætlar hann so at biðja um samráðingar við danska statin um at fáa ráevnini yvirtikin spyr Jógvan Páll Lassen! –Tað hann leggur upp til í lýsingini er í veruleikanum ein viðurkenning av, at vit ikki hava fingið nakran rætt. Tað hevði verið ein grov viðurkenning frá okkum at sagt, at vit hava ongan rætt og tí biðið um at fáa samráðingar einaferð aftrat.

- Vit hava yvirtikið ráevnini í undirgrundini, og tað er eingin ivi um, at hetta fevnir um olju. Tað kann tí vera til stóran skaða fyri Føroyar nú at siga nakað annað.

## British Gas umhugsar støðuna

OLJUFUND
*Jan Müller*

Tá oljusamtakið Faroes Partnership herfyri náddi ætlaða dýpið í boring síni á landgrunninum vildi eitt av felagnum ikki vera við til at halda fram við boringini nakrar hundrað metrar aftrat. Tað var bretska oljufelagið British Gas. Chris Carter frá kunningardeildini hjá BG váttar fyri Sosialinum, at teir út frá handilsligum orsøkum ikki vildu vera við til at bora teir 300-400 metrarnar longur niður, tá Amerada Hess og Dong tók allan vágan á seg, boraðu longur niður og funnu olju og gass.

– Vit vóru við í boringini til málið, ið vit høvdu bundið okkum til. Tá avgjørt varð at fara longur niður gjørdu vit av ikki at vera við. Tað var ein innanhýsis avgerð, sum bygdi á metingar okkara av útlitinum at finna nakað. Umboðsmaðurin hjá BG sigur, at teir enn eru við í samtakinum, og at teir eisini hava møguleika at keypa seg inn aftur í tann partin teir ikki vórðu við til at bora. Hann viðgongur, at tað kann gerast kostnaðarmikið. – Vit eru bodnir at koma við aftur, og vit eru førir fyri tí. Nú tosa við so um tað.

Chris Carter sigur, at BG hevur fleiri boriætlanir í ár og í næsta ár, og tað var eisini út frá hesi støðu, at teir valdu ikki at vera við til at bora longur niður. Hann sigur annars, at teir eru sera fegnir um úrslitið av boringini. – Fundið, sum er gjørt, vísir, at kolvetni eru í undirgrundini, og hetta er sera áhugavert. Vit mugu nú gera støðuna upp. Vit eru framvegis sera áhugaðir í at vera við í leiting við Føroyar. Men tað er framvegis tíðliga í leitingini og nógv skal kannast og analyserast.

# Sáa ikki iva – vilja rudda hann av vegnum



*Høgni Hoydal, varaløgmaður: – Eg sái ikki iva um ognarrættin*

OLJA OG OGNARRÆTTUR
*Edvard Joensen/Jan Müller*

Eftir at endaliga úrslitið av valinum varð greitt týskvøldið bóðu vit Høgna Hoydal, formann Tjóðveldisfloksins um eina viðmerking til úttalilsini hjá eitt nú Halgir W. Poulsen, løgfrøðingi í Sosialinum sama dag um ognarrættin til oljuna. Løgfrøðingurin og løgmaður halda tað vera ábyrgdarleyst, tá Høgni Hoydal í vallýsing sáar iva um ognarrættin til oljuna. Og samtíðis sigur stjórin í Oljumálastýrinum, at hetta er sera óheppið.

Høgni Hoydal sigur, at Tjóðveldisflokkurin hevur ongantíð sátt iva um ognarrættin til undirgrundina. Hann vísir á, at Tjóðveldisflokkurin reisti málið frá fyrstan tíð av, tí hetta er tengt at tjóðarrættinum.

- Trupulleikin er tann, at danska stjórnin hevur ongantíð viðurkent hetta beinleiðis. Man hevur gjørt eina avtalu, sum vit kunnu tulka okkara veg, og tað gera vit eisini. Vit sáa ikki iva um ta avtaluna, men vit siga, at tað er sera týdningarmikið at fáa tað sligið rimmarfast, so einki stríð kann blíva.

Høgni Hoydal sigur víðari, at vit kunnu jú ímynda okkum, alt eftir hvat hendir í Danmark, um Anders Fogh Rasmussen brúkar Dansk Folkeparti sum grundarlag, at tað fer at verða reistur ivi um hetta málið, og tá hvílir tað bara á politiskari avtalu millum Føroyar og Danmark.

- Vit hava sæð, hvat tað elvir til. Danmark kann - eins og vit sóu í 92 og sum vit hava sæð tað í Natomálinum og eisini nú teir seta danskar lógir í gildi uttan at spyrja okkum eftir - við síni politisku makt broyta nøkur viðurskifti, tá vit ikki hava fingið tey staðfest í altjóða rætti. Tað er tað vit siga: lat okkum fáa tað uppá pláss, so valdar eingin ivi. Vit sáa ikki ivan, vit vilja bara hava ivan ruddaðan av vegnum.